# Andrew Strong og Mustang Sally tóku heimin á bóli



**Tá Filurin um The Commitments kom í 1990, var tað ein einans 17 ára gamal Andrew Strong, ið við síni hásu og sterku sødd sang Mustang Sally og onnu løg, ið tók allan heimin á bóli. Nú sleppur hann at royna seg á føroyskum palli á Jóansøku-festivalinum og tað verður við øllum, ið hoyrir til, so sum blásarum og kórsangarum**

JÓANSØKU-FESTIVALUR

Í 1990 trein ein ungur maður á heimspallin. Við filminum um royndirnar hjá nøkrum ungum írum at stápla ein bólk á beinini, The Commitments, gjørdist Andrew Strong stjørna.

Flest øll kenna filmin, eins og flest øll kenna Andrew Strong og hansara útgávu av Mustang Sally. Síðani hevur Andrew Strong havt eina gylta yrkisleið sum tónleikari og fleiri hitt hava verið at hoyra við honum. Fyri stuttum gav hann út fløgu við størstu hittunum og har kunnu nevnast t.d. Ain't No Mountain High Enough og so sjálvandi Mustang Sally. Hann hevur ferðast heimin runt og er fyri stuttum komin aftur av ferð í Avstralia.

The Commitments var sum so bert heitið á bólkinum í filminum við sama navnið. Tó hendi tað, at fleiri vildu hava Andrew Strong og The Commitments at spæla. Hetta var sum so ongantíð ætlanin og er tí veruleikafjart. Tó hevur ein bólkur ferðast undir navninum The Commitments og vitjaði hesin eisini í Føroyum og hevði eina væl swingandi konsert í Norðurlandahúsinum fyri fáum árum síðani.

Tá var Andrew Strong ikki við, men hann hevur sama stíl, sín stíl, og tey, ið kenna tónleikin vita, at hetta er tónleikur, ið er sum gjørdur at spæla á palli. Hetta er blues og rockur við sál, og slíkur tónlekur er bestur live, tá bæði sangarar, blásarar og aðrir tónleikarar geva alt teir eiga og njóta hvørja løtu.

Síðani gjøgnumbrotið við filminum hevur Andrew Strong, ið er føddur í 1974, havt gylta yrkisleið. Í 1991 verður hann innstillaður til bæði BAFTA Award og Grammy Award. Sama ár verður The Commitments útgávan seld í 15 milliónum eintøkum um allan heim.

*Og meðan Eiðið og umhvørvið har á leiðini stolt, høgt og steyrrætt randar Jóansøkufestivalin, kann Andrew Strong hóskandi syngja Ain't No Mountain High Enough.*

Í 1992 er Andrew Strong á heimsferð við The Stones, Elton John, Prince, Brian Adams, Lenny Kravitz og Ray Charles.

Í 1993 letur hann fyrstu solofløguna úr hondum og hon fær platín. Hann fær sær egin upptøkuhøli í 1995 og í 2000 skrivar hann undir útgávusáttmála við EMI. Í 2001 kemur kemur fløgan Out of Time, ið fær platín, og í 2002 kemur fløgan Gipsy's Kiss, ið somuleiðis fær platín. Í 2003 skrivar hann nýggj løg og í 2005 kemur Greatest Hits fløgan.

Líka til hálvan juni, ella har á leið, hevur Andrew Strong verið á ferð í Avstralia, men á jóansøku er tað vakra umhvørvið vesturi á Eiðinum í Vági, sum er karmur um frálíku tulkingina av Mustang Sally og øðrum blues-rock løgum. Og meðan Eiðið og umhvørvið har á leiðini stolt, høgt og steyrrætt randar Jóansøkufestivalin, kann Andrew Strong hóskandi syngja Ain't No Mountain High Enough.

# Blues-kvøld startsskot til Jóansøkufestivalin

**Jóansøkufestivalurin byrjar tórskvøldið 22. juni, tá besta blues-kvøld í Føroyum nakrantíð verður í Stóra Pakkhúsi í Vági**

JÓANSØKU-FESTIVALUR

Talan er um eitt kvøld, har danski blues bólkurin, Thorbjørn Risager: Blue 7 og føroyska blues-trio'in Gogo-Blues fara at spæla hvør sær og saman. Karmarnir í Stóra Pakkhúsi eru framúr góðir til slík intim tónleikatiltøk og er nógv í væntu av hesum kvøldinum.

Jóansøkufestivalurin bjóðar tónleik á fleiri pallum í býnum. Tann stóri pallurin verður á sjálvum festivaløkinum, har tónleikur verður undir opnum himmali – Open Air – fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Men harumframt verða eisini festivaltónar í Stóra Pakkhúsi í Vági bæði tórskvøldið, fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið, umframt at ein pallur verður á bryggjuøkinum, har tónleikur og undirhald er á skránni.

## Stóra Pakkhús

Í Stóra Pakkhúsi er sum nevnt eitt blues-kvøld á skránni. Fríggjakvøldið spæla og undirhalda Robert McBirnie og Jógvan Dahl. Leygarkvøldið, eftir at Jóansøkufestivalurin endar á Eiðinum, fer Rasmus Lyberth at spæla í Stóra Pakkhúsi. Og høvuðsnavnið á skránni sunnukvøld er Maria Guttesen, sum saman við Petsy Tvørfoss fer at framføra í Stóra Pakkhúsi – hetta verður somuleiðis endin á skránni fyri Jóansøkufestivalin 2006.

## Pallur á keiøkinum

Leygardagin verður tónleikur og undirhald á pallinum á bryggjuøkinum, har millum annað Eyðun & Neil fara at spæla og Angela og Hannibal fara at undirhalda.